## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Skrið ella stormur av landsynningi og yvirhøvur turt. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin hvassur vindur ella skrið av landsynningi og stundum regn. Seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og regn av og á. Út á seinnapartin minni vindur og møguliga turt. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og týsdagin kanska okkurt ælið, men mikudagin regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Durita ger lýsingar

**Durita Dybzcak gongur í 9. b í Eysturskúlanum. Hon er í starvsvenjing á grafiska virkinum, Repro-Z. Sjálvt um hon er handikappað og situr í koyristóli, so er tað ongin trupulleiki**

STARVSVENJING
*Ingrid Bjarnastein*

*Durita, sum situr í koyristóli, fær als ikki flutt armarnar, men hetta er ongin trupulleiki. Hon er í starvsvenjing á Repro-Z, har hon hevur roynt at gera lýsingar*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Sjálvt um tú ert handikappaður, er tað ongin forðing fyri, at tú ikki kanst fáa eitt arbeiði.

Durita Dybczak úr 9. b úr Eysturskúlanum er í starvsvenjing á grafiska virkinum Repro-Z í Havn. Har hevur hon fingið sína egnu teldu, sum er sett upp til hennara, har hon kann gera alt.

– Ein telda er sett upp til mín, og forritini havi eg fingið inn á joystickið á koyristólinum, so eg kann stýra øllum herfrá, sigur Durita.

– Tað er ongin trupulleiki at sita frammanfyri eina teldu allan dagin, tí tað eri eg von við frá skúlanum. Har siti eg frammanfyri eini teldu allan dagin, og øll míni skúlating verða gjørd á telduni uttan lesturin.

Duritu dámar ógvuliga væl at vera í starvsvenjing á Repro-Z. Hon sigur, at hetta er eitt arbeiðið, ið hon væl hevði kunnað hugsað sær.

– Eg hyggi hvussu tey arbeiða her, og so havi eg eisini roynt at gera onkra lýsing, sigur Durita.

– Tá eg eri liðug at gera tað, sum eg skal, sleppi eg heim, og tað er um trý tíðina seinnapartin. Eg byrji umleið klokkan hálvgum níggju um morgunin.

Á Repro-Z lata tey ógvuliga væl at arbeiðnum hjá Duritu, og hesar tvær vikurnar hon hevur verið í starvsvenjing er hon fallin væl til. Starvsvenjingin hjá Duritu endar í dag.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | – |
| Ammassalik | – |
| Saint John's | 8 |
| Halifax | 9 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 14 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 17 |
| Róm | – |
| Malorca | 20 |
| Athen | – |
| Malta | – |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | 14 |
| New York | 18 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 6 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 978 hPa í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og grynnist.

Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi grynnist framvegis, men brúgvalagið haðani kemur hendavegin og verður yvir Føroyum leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/10 kl. 06⁰⁰– 09/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,8°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 08/10 kl. 06⁰⁰– 09/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 20,1 mm

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

## VESTFALLSKYRRINDI

6. okt.: Tendring/Mánin næstur jørðini
13. okt.: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. okt. | 11.24 | 23.52 | 10.24 | 22.52 | 10.39 | 23.07 | 00.57 | 13.24 | 01.57 | 14.24 | 09.39 | 22.07 | 08.39 | 21.07 | 11.39 | — | 00.12 | 12.39 | 11.09 | 23.37 | — | 12.24 |
| 12. okt. | — | 12.19 | 11.19 | 23.46 | 11.34 | — | 01.52 | 14.19 | 02.52 | 15.19 | 10.34 | 23.01 | 09.34 | 22.01 | 00.07 | 12.34 | 01.07 | 13.34 | — | 12.04 | 00.52 | 13.19 |
| 13. okt. | 00.46 | 13.26 | — | 12.26 | 00.01 | 12.41 | 02.46 | 15.26 | 03.46 | 16.26 | 11.41 | — | 10.41 | 23.22 | 01.01 | 13.41 | 02.01 | 14.41 | 00.31 | 13.11 | 01.46 | 14.26 |
| 14. okt. | 02.07 | 14.46 | 01.07 | 13.46 | 01.22 | 14.01 | 04.07 | 16.46 | 05.07 | 17.46 | 00.22 | 13.01 | — | 12.01 | 02.22 | 15.01 | 03.22 | 16.01 | 01.52 | 14.31 | 03.07 | 15.46 |

5 707265 100050 >